ítróttur

Nr. 59 • mikudagur • 30. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fótbólturin fór á rull

Uppgerðin í Klaksvík millum arvafíggindarnar, KÍ og HB, byrjaði við buldur og brak. Eftir bara 22 minuttum vóru fýra mál skotin, og tó at ferðin dalaði nakað eftir hetta, so skerst ikki burtur, at talan var um ein framúr undirhaldandi dyst, tá hugsað verður um, at hetta var fyrsti landskappingardysturin á árinum.

Og eins og teir gjørdu tað í fjør, so hevur Skála lagt seg á odda í bestu deildini eftir fyrsta umfarið. Hesaferð var tað TB, sum fekk av at vita, tá Skála við einum 5-1 sigri staðfesti, at bronsukrónurnar í fjør als ikki vóru úrslit av nakrari tilvild.

NSÍ, ÍF og EB/-Streymur fingu eisini fult, tá tey á útivølli bastu ávíkavist B36, VB/Sumba og GÍ.

Jú. bólturin er framvegis rundur, og nú er hann av álvara farin á rull. Eisini her í Sosialinum eru vit við, nú kappingin byrjar, og hevur fótbólturin sín stóra part av ítróttinum í blaðnum í dag.





## Írland er væl fyri

síða 28



## Carl Eli nýggjur meistari

síða 24-25



## Stjørnan vil hava málveitslur

síða 29